

*– Eg visti ikki míni livandi ráð, tá ið eg gjørdist við barn fjórðu ferð, og í neyðini umhugsaði eg eisini at taka ófødda barnið. Men eg hevði ikki samvitsku til tað og avgjørdi at ganga við barninum og føða barnið, sum eg vænti kemur um ein mánaða ella so, sigur Nanna H. Jacobsen*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# – Í Føroyum er ikki livandi hjá einligum mammum

**– Eg havi óteljandi ferðir verið á dyrnum hjá Almannastovuni, bæði einsamøll og saman við barnaverndarumboðum, men framvegis hava vit ikki fingið tær umstøður, sum vit halda, at vit hava rætt til. Tey siga, at tey vilja royna, og tey siga seg skilja meg og okkara umstøður, men tá ið svarið umsíðir kemur, eru eingir batar kortini, sigur Nanna H. Jacobsen, sum er ung, einlig mamma við børnum**

FØROYAR 2006
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Nanna H. Jacobsen er 24 ára gomul. Hon eigur trý børn, sum eru 7, 5 og 1 ára gomul. Fjórða barnið er á veg, og væntandi kemur tað um ein mánaða ella so.

Unga kvinnan, sum hevur sín uppruna í Sandoynni, men býr til leigu á Skálafjørðinum, livir sum einlig mamma.

Elsta barnið, 7 ára gamli sonurin Kristian, býr hjá pápa sínum í Danmark.

Aftrat sær sjálvari hevur Nanna 5 ára gomlu Shailu og 1 ára gomlu Saritu.

Ymiskt er, hvussu umstøðurnar hjá fólki kunnu laga seg. Mong viðurskifti hevur tú ávirkan á, meðan onnur kunnu koma yvir teg – uttan, at tú sjálv/ur biðir um tað.

Orsøkin til, at Nanna livir einsamøll í dag, er ítøkilig. Tað snýr seg um eina hending, sum førdi til, at hon í fjør heyst bað mannin pakka sekkin og fara. Hendingin, talan er um, er ikki viðkomandi fyri hesa grein.

Maðurin er pápi til yngstu dóttrina og ófødda barnið.

Nanna stendur í dag, har hon stendur – við trimum børnum og skal eiga fjórða barnið um ein mánaða. Barnsburðurin og eitt ára gamla dóttirin binda hana nógv, og hon hevur smáar møguleikar at fara út um heimið, tá ið hon býr á Skálafjørðinum, og mamman býr í Vágum.

## Nógv stríð

Vit hava tosað við Nannu um umstøðurnar hjá henni sum einligari mammu. Hon hevur eisini búð í Danmark, og tí veit hon, hvør munurin er at vera einlig mamma í Føroyum og Danmark.

Nanna sigur, at hon hevur brúkt ógvuliga nógva orku til at tosa við Almannastovuna um viðurskiftini, og hon er avgjørd, tá ið hon sigur, at hetta hevur kenst sum ein oyðimarkargongd, har tað hevur verið torført at fáa Almannastovuna at hjálpa henni, soleiðis at hon og børnini kunnu liva eitt sámiligt lív.

– Tey spyrja, hví mínar umstøður hava lagað seg soleiðis, og tað er sjálvsagt eisini í lagi, at tey gera tað. Tá ið eg búði í Danmark, spurdu tey eisini, men tá kendi eg tað, sum lurtaðu tey eftir mær.

Hon sigur, at umstøðurnar hjá eini einligari mammu í Danmark og í Føroyum als ikki kunnu samanberast, tí møguleikarnir í Danmark eru so nógv betri enn her heima.

Nanna leigar eini hús á Skálafjørðinum til seg og genturnar. Leigan er 6.000 krónur um mánaðin, men tá eru bæði olja og el íroknað.

– Eg haldi ikki, at hetta er so øgiliga dýr leiga, tá ið hugsað verður um, hvussu dýr oljan er, og hvat streymurin kostar, sigur hon.

Hon leggur aftrat, at hon fekk hesi húsini til leigu við "neyð og deyð", tí fleiri vóru um boði.

– Vit búðu í Fuglafirði, tá ið hendingin við manninum gjørdi, at eg bleiv einsamøll, og barnaverndin á staðnum helt, at vit gjørdu best við at skifta umhvørvi.

## Røkkur ikki

Hon sigur, at aftrat leigupeninginum, fær hon smáar 3.000 krónur um mánaðin at liva fyri frá Almannastovuni.

– Tey siga, at hetta er tað, sum eg kann fáa, men hetta røkkur ikki til mat og klæðir til okkum - og als ikki til tey gjøld, sum fylgja við einum húsarhaldi, sjónvarps- og útvarpsgjald og sjúkrakassa.

Nanna sigur, at við hesi veiting útyvir leiguna er eingin møguleiki at geva børnunum døgurða hvønn dag, ei heldur at keypa teimum tey klæði, tey hava brúk fyri – og børnini í hesum aldri passa ikki somu klæði ár um ár.

– Eg havi óteljandi ferðir verið á dyrnum hjá Almannastovuni, bæði einsamøll og saman við barnaverndarumboðum, men framvegis hava vit ikki fingið tær umstøður, sum vit halda, at vit hava rætt til. Tey siga, at tey vilja royna, og tey siga seg skilja meg, men tá ið svarið umsíðir kemur, eru eingir batar kortini.

Hon sigur, at tað kennist sum at renna seg ímóti einum múri at tosa við Almannastovuna, og hon er við at missa vónina um, at korini fara at gerast rúmari.